# Cancallera vann prologin

Fabian Cancellera var átta sekund undan næsta súkklaranum, tá stóri súkklukappingin kring Sveis byrjaði í gjár. Átta sekund ljóðar ikki av nógv, men á einum einkultstarti yvir fýra kilometrar er talan um heilt stóran mun. Cancellera hevði undan kappingini boðað frá, at hann ætlar sær at vinna báðar einkultstartirnar, og nú hevur hann hálvgum rokkið hesum málinum.



# Wiltord liðugur í Lyon

Franski landsliðsspælarin, Sylvain Wiltord, er liðugur í Lyon. Hetta er greitt eftir at spælarin hevði boðið konufólki inn á hotelkamari hjá sær undan dystinum móti Rennes. – Sylvain fer úr felagnum. Hann er farin um markið fyri tí, sum spælararnir loyva honum, og tí er hetta ikki ein spurningur um at selja spælaran. Hann er liðugur, sigur formaðurin í felagnum, Jean-Michels Aulas.

## Fróði søkti barndómsfelagið

Fróði Clementsen hevur fyri tað mesta fingið sína fótbóltsuppaling í B36. Men tað merkir ikki, at hann hevur verið serliga blíður við barndómsfelagið í ár. Tríggjar ferðir hevur AB spælt móti B36, og hvørja ferð hevur Fróði skorað. Og týdningarmesta málið av hesum var helst sunnudagin, tá hann í yvirtíðini sendi brotsspark í netið.

Men tað var ikki júst ætlanin, at Fróði skuldi taka brotssparkið.

- Vit høvdu sum so ikki avtalað nakað. Súni Fríði varð so biðin um at skjóta, men hann segði, at hann kendi seg ikki heilt tryggan, og so átók eg mær uppgávuna.

Kendi tú stórt trýst á tær?

- Ikki sum so. Men eg hopaði bara, at eg skoraði. Og hóast hetta helst er týdningarmesta brotssparkið, sum eg havi skotið, so havi eg oftani kent tað tyngri, beint tá eg skal skjóta.

Og hetta er triðja málið hjá tær móti barndómsfelagnum?

- Ja. Eg veit ikki, hvussu tað ber til, men tað hevur so riggað væl móti júst teimum. Teir hava annars eina sterka verju, men tað hevur so riggað onkursvegna.

Sigurin ber við sær, at AB nú bert er tvey stig undir niðurflytingarstrikuni. Og Fróði staðfestir eisini, at tað nú sær munandi betri út hjá teimum.

- Vit hava ongan tíð av álvara sæð so svart uppá tað, men sjálvandi er lagið í hópinum gott júst nú. Nú eru KÍ og B71 so beint framman fyri okkum, og tað setir aftur krøv til okkum. Megna vit ikki at fylgja hesum sigrinum upp við góðum úrsliti komandi dystirnar, so er talan at kalla um spiltar kreftir.

## Ein strika í rokningini

Herbert í Lon Jacobsen var alt annað enn nøgdur um, at hann og B36 taptu útidystin á Argjum.

- Hetta var ein stór strika í rokningini hjá okkum, men vit mugu bara ásanna, at vit megnaðu ikki at halda leiðslusni. Eg haldi annars, at vit høvdu fult tamarhald á dystinum, og at hepnið so avgjørt ikki var við okkum. Ikki tí at vit skaptu so øgiliga nógv, men vit halda teimum mest sum púrasta frá málinum. Men teir fáa so kortini tvey mál, og tað er ikki nokk.

NSÍ og EB/Streymur vunnu sínar dystir. Er trýstið á tykkum størri, nú tit hava dyst móti EB/Streymi í næsta umfarinum?

- Sjálvandi. Tað er ein dystur, sum vit mugu og skulu vinna. Men tað var tað nú eisini undan hesum tapinum. Men vinna vit, so hava vit í øllum førum rættað nakað uppaftur, so í sjálvum sær nýtist tapið ikki at vera nøkur vanlukka. Men ein stór strika í rokningini var tað avgjørt, sigur Herbert.

AB-B36 2-1 (0-0):

# Sigfríður kann bjarga AB

**Venjaraskiftið tykist hava stóra ávirkan á Argjum, har teir nú av álvara anda KÍ í nakkan. Fýra av seks seinastu stigunum eru endað á Argjum**

*AB*

*B36*



*Fyri fyrstu ferð í ár eydnaðist Rana D. Christiansen og liðfeløgunum á Argjum at vinna heimadyst*

*savnsmynd*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B36 dummaði seg í oddastríðnum, og AB vann ein sera týdningarmiklan sigur í botnstríðnum. Somikið einfalt kann útfallið av dystinum á Argjum sunnudagin tulkast.

Talan var um næsta dystin hjá Sigfríði Clementsen sum AB-venjara, og hann er longu í ferð við at seta síni fingramerki á spælið hjá liðnum.

Við einum kompaktum útgangsstøði, har stutt er millum keturnar, megnaði AB fyri tað nógva at rýsta í undanvindinum, sum teir høvdu fyri steðgin. Enn tá uttan at hetta kostaði nakrar kontra-møguleikar til B36.

Árstalsfelagið var tó ikki púrasta fyri ongum. Teir spældu skilagott við bóltinum á jørðinni, og nakrar ferðir sluppu teir eisini fram við í borðunum. Nógvi vindurin tóktist tó nerva spælið, og einamest mundi gestirnir bíða til undanvindin, sum var í væntu seinna hálvleik.

### Mótbrekka í undanvindi

Tað varð tí lagt upp til eitt stórt trýst frá gestunum eftir steðgin. Men hóast vindurin enn var hin sami, so kom trýstið ongantíð. Partvíst tí B36 hevði sera ilt við at flyta liðið niðan á vøllin, so trýstið veruliga kundi haldast. Men einamest tí AB spældi serstakliga skilagott. Peder Christiansen var snúningspunktið á miðvøllinum, har bólturin alla tíðina varð hildin á jørðini, og hóast AB nú var meira verjukent, so lúrdi møguleikin fyri einum kontra-máli allatíðina.

Súni Fríði Barbá og Fróði Clementsen vóru eisini nær við at revsa verjuvillur hjá B36, men brádliga vísti Sylla enn einaferð, at hann er millum vandamestu álopsspælararnir í landinum.

AB-verjan hevði annars hildið gestunum mest sum púrasta frá møguleikum. Men verjuspælarin fylgdi við, tá ivorianin leitaði djúpt, og so var hann skjótur at renna í tóma holið og hegnisliga stýra bóltinum í netið.

Tað tóktist vera sama søgan, har oddaliðið hevur neyðugu marginalarnir við sær, men argjamenn vildu ikki geva seg. Lítla løtu seinni javnaði Rógvi Poulsen, tá hann var fyrstur á frísparki, sum varð sent inn um B36-verjuna. Ivaleyst kundi sama B36-verja staðið betri um hetta mundið, og tað kundi hon í øllum førum tá seinna AB-málið kom.

Ingi Højsted, sum fyri fyrstu ferð í eitt ár var á besta B36-liðnum, spældi tvørbólt, sum AB fangaði, og so gekk skjótt fyri seg.

Enn einaferð stóð Rógvi Poulsen leysur, og tá hann kipti bóltin fram við Jákupi Mikkelsen, bar hann í armin á Herbert í Lon, sum bakkaði upp.

Brotsspark til AB, og so var fagnaðurin stórur, tá Fróði Clementsen sparkaði bóltin hart og flatt í kassan. Fyri fyrstu ferð hevði AB vunnið heimadyst í Formuladeildini. Og at tað var móti júst grannunum gjørdi ikki dagin verri.

### Formkreppa í B36

Sigurin ber við sær, at AB nú av álvara sær møguleikan at bjarga tilveruni í deildini. Munurin upp til KÍ er nú bara tvey stig, og tí verður spenningurin serstakliga stórur komandi umførini.

Hjá B36 var talan hinvegin um eina blamagju av teimum stóru. Kappingarneytarnir í oddastríðnum høvdu vunnið sínar dystir leygardagin, og tí kendi B36 treytirnar, áðrenn farið varð á vøllin.

Og hóast teir enn eru við í oddastríðnum, so er formkurvan hjá árstalsfelagnum ikki nøkur serlig. Seinastu tríggir dystirnir hava bara givið tvey stig, og leitast skal aftur til 20. mai fyri at finna seinasta B36-sigurin.

Komandi umførini standa uppgerðir móti EB/Streymi og HB á skránni, og hesar mugu helst roknast sum sannleikans tími hjá B36.